

*Við eitt vóru maskinmeistararnir hjá SEV millum mest umtalaðu persónarnar í landinum. Òttin fyri streymslit var stórur - men gjørdist ongantíð veruleiki.*

# 2003 deja-vu

**Júst hendan støðan á arbeiðsmarknaninum er ikki komin fyri áður, men tað hendi nakað í 2003, sum av álvara minnir um**

AFTURLIT

*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Tað var 3. mai 2003, at Sosialurin kundi bera tíðindini um, at Karsten Hansen, sum tá var landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevði í hyggju at vraka sáttmálin millm Elfelagið SEV og Maskinmeistarafelagið. Hann segði tá:

- Eg havi ikki fingið nóg góð argumentir til at góðkenna sáttmálan.

Orsøkin er einføld: Lønarhækkingin er ov stór

Upprunaligi sáttmálin skuldi vera galdandi frá 1. mars 2003 og tvey ár fram. Sáttmálin gav teimum umleið 45 maskinmeistarunum hjá SEV 4,3% í lønarhækkan 1. mars 2003 og tað sama árið eftir umframt aðrar ábøtur upp á sáttmálan.

Hendan støðan var púra ókend. Góðkenningin hjá landsstýrismanninum hevði undan 2003 at kalla bert verið ein formalitetur, og tað kom serligt óvart á Maskinmeistarafelagið, at landsstýrismaðurin nú skuldi leggja seg út í máli.

17. juni vrakar Karsten Hansen aftur eina semju mill SEV og Maskinmeistarafelagið. Tá sigur Karsten Hansen:

- Eg kann ikki lata meg stýra av hóttanum um arbeiðssteðg, og eg má nýta tey amboð, sum eg havi, at stýra búsakapinum við. Tað er einki, sum rættvísgerð eina slíka lønarhækking.

Lítið munur var á vrakaðu sáttmálunum.



*Varaløgmaður vildi í 2003 latið løgtingið leggja uppí. Í skrivandi stund hevur løgtingið ikki viðgjørt málið*



*Karsten setti í sínari tíð hart ímóti hørðum. Lønarhækkingin hjá maskinmeistarunum hjá SEV skuldi ikki vera størri enn tann hjá fólki á privata arbeiðsmarknaðinum*

### Endiliga semja

Tað var ikki fyrr enn 18. juni 2003, at Karsten Hansen loksins kundi veita einum lønarsáttmála sína samtykt. Maskinmeistarafelagið roknaði endaligu semjuna til eina lønarhækkan áljóðandi 10,96% yvir 28 mánaðir. Einasta broytingin í mun til vrakaðu sáttmálarnar var, at sáttmálin nú var galdandi til 1.juli 2005 heldur enn 1. mars 2005.

Trupulleikin á vári 2003 var fyri landsins myngdugleikar, at sáttmálin millum SEV og maskinmeistararnar var tann fyrsti av væl oman fyri tretivu sáttmálum, sum skuldu avgreiðast um hetta mundið - bæði á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum. Og hildið var, at hesin sáttmálin fór at verða nýttur sum grundarlag undir teimum komandi samráðingunum.

Sáttmálasamráðingarnar gingu heldur ikki eftir vild hetta árið. Landið varð lagt lamið av verkfalli á privata arbeiðsmarknaðinum.

Karsten Hansen segði 18. juni 2003:

– Eg havi allatíðina sagt, at maskinmeistararnir kundu fáa tað sama, sum feløgini á tí privata arbeiðsmarknaðinum,Teir privatu hava lagt eina linju, og hana vóru vit í hesum førinum noyddir at fylgja, sigur Karsten Hansen.

The rest is history.

### Heimildin í lagi

Í fyrsta umfari umfari spurnartekin við, um landsstýrismaðurin hevði heimild til at vraka sáttmálan. Rúni Joensen, sum tá var aðalstjóri í Løgmálaráðnum, segði soleiðis við Sosialin:

– Landsstýrismaðurin skal góðkenna allar slíkar sáttmálar sambært kommunustýrislógini.

Tá var kommunustýrislógin rættiliga nýggj, men heimildirnar hjá landsstýrismanninum vóru einki nýtt í fyrisitingarligum høpi.

§ 5, stk. 5. í kommunustýrislógini sigur:

"Ásetingarnar í sáttmálum og avtalum um lønar- og setanarviðurskifti fyri kommunal starvsfólk (íroknað kommunalar felagsskapir) og flokkingar og stig fyri størv, sum ikki frammanundan greitt eru ásett í sáttmála ella avtalu, skulu góðkennast av landsstýrismanninum."

Í viðmerkingunum til lógina stendur:

"Ásetingin skal verða við til at tryggja eitt javnt alment lønarlag og at samsvar er millum lønir hjá landinum og hjá kommunum. Sostatt skulu sáttmálar og avtalur, sum kommuna, kommunur ella kommunalir felagsskapir gera, har ásetingar eru um løn- og setanarviðurskifti góðkennast av landsstýrismanninum."

### Djurholm vildi løggeva

Støðan fyri tveimum árum síðani var øðrvísi á tann hátt, at maskinmeistararnir ikki fóru í verkfall, og fólk kring landið fingu streym sum vant. Ì dag er ein onnur støða.

Fyri tveimum árum síðani var tankin um streymloysi kring landið púra óhugsandi. Landsstýrismaðurin í vinnumálum og núverandi varaløgmaður, Bjarni Djurholm segði tá:

- Fer eitt verkfall hjá SEV at leggja landið myrkt, er ongin ivi um, at Løgtingið fer at leggja uppí.

– Tað kann ikki góðtakast, at landið verður sløkt og tí er onki at ivast í, at Løgtingið verður kallað saman at viðgera støðuna. So fáa vit at síggja, um meirilutin fæst fyri at seta ein sáttmála í gildi við lóg, so at endi fæst á einum slíkum verkfalli beinanvegin.

## Landsstýrið viðger støðuna

Eftir evstamark fór landsstýrið á fund at viðgera ósemjuna millum SEV og maskinmeistararnar. Undan fundinum útilokaði Bjarni Djurholm ikki, at uppskot varð lagt fyri løgtingið fyri at loysa ósemjuna, men eingin støða var tikin, tá blaðið fór til prentingar.